*Føroya Kommunufelag um OLE2*



*Asbjørn Djurhuus formaður*

Um allan heimin er fokus settur á eldra økið. Framtíðarútrokningar vísa á, at hópurin av eldri borgarum veksur, samstundis sum alt færri ung verða til at bera samfelagið. Vit vita eisini, at krøvini til lívsvirðini verða størri í framtíðini. Tí er neyðugt at kanna, hvussu møguligt verður at veita betri tænastur á burðardyggan hátt.

Spurningurin um hvar tann eldri borgarin vil vera á ellisárum er svaraður eins bæði í Føroyum og aðrastaðni tann eldri vil vera í egnum heimi so lengi sum gjørligt. Við luttøku í tvørtjóðaligu verkætlanini *Okkara Lív sum Eldri* – OLE2, vil Føroya Kommunufelag vegna limirnar vera við í arbeiðinum at fáa til vega vitan og amboð at brúka á eldra økinum í framtíðini.

Endamálið við OLE2, er at fremja viðmælini frá fyrra partinum av verkætlanini *Okkara Lív sum Eldri*. Fyri føroysku kommunurnar er tað upplagt at brúka hendan møguleikan at fáa bygt upp umstøður fyri eldri borgarar, sum vil koma kommununi til góðar í framtíðini. Sum dømi um hetta er minni tørvur á stovnsplássum um fólk eru før fyri at búgva longur heima.

Viðmælini vísa á tørv fyri aktivitetum sum avloysa arbeiðsdagin, og felagsskap sum avloysir arbeiðsfelagar, tá eldri borgarar fara frá. Endamálið við aktivitetum av hesum slag, er at fáa skapt møguleikar fyri netverkum sum stuðla undir betri lívgóðsku hjá eldri borgarum. At skapa umstøður fyri netverkum sum eldri borgarin **sjálvur** stendur fyri, har hann hevur møguleika at vera saman við øðrum, at samskifta við familju og/ella onnur við somu áhugamálum og at fáa til vega upplýsingar teir hava fyri neyðini. Hetta er tað vit fara at taka upp í OLE2.

Úrslitið frá verkætlanini verður dokumenterað við einum leisti sum kommunur her - sum í øðrum londum kunnu gera brúk av.

Verkætlanin verður stuðlað av ES skránni Northern Periphery Program - NPP, og okkara samstarvsfelagar eru Oulu kommuna í Finnlandi og Luelå kommuna í Svøríki.

Northern Periphery Programme 2007–2013 Innovatively investing in Europe's Northern Periphery for a sustainable and prosperous future

European Union European Regional Development Fund

OLE2